## Helena Dam á Neystabø á ting fyri Javnaðarflokkin

**Hann var løgtings- og landsstýrismaður fyri Verkamannafylkingina. Hon var løgtings- og landsstýriskvinna fyri Sjálvstýrisflokkin. Næstu fýra vikurnar umboða tey bæði Javnaðarflokkin í høvuðsstaðnum á tingi**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Á tingfundinum í morgin fer John Johannessen, løgtingsmaður, at biða løgtingið um farloyvi frá løgtingsarbeiðinum næstu fýra vikurnar. Orsøkin er tann, at hann skal umboða løgtingið á ST-aðalfundinum í New York hetta tíðarskeiðið.

Á hvørjum ári eru tveir løgtingsmenn upp á skift, fýra vikur hvør, við til ST-aðalfundin sum partur av donsku sendinevndini. Hesaferð verður John Johannessen fyrru fýra vikurnar, meðan Jørgen Niclasen úr Fólkaflokkinum verður í New York seinnu fýra vikurnar.

Varafólk hjá John Johannessen á tingi er Hel-ena Dam á Neystabø, fyrrverandi løgtings- og landsstýriskvinna. Hon sat á tingi fyri Sjálvstýrisflokkin árini 1990-2002, tá hon fór úr Sjálvsstýrisflokkinum.

Til seinasta løgtingsval í 2004 stillaði hon upp fyri Javnaðarflokkin, sum fekk tvey umboð vald í Suðurstreymoyar valdømi, Kristian Magnussen við 412 atkvøðum og John Johannessen við 380 atkvøðum. Helena Dam á Neystabø var nummar trý við 341 atkvøðum, meðan Katrin Dahl Jakobsen, sum varð vald á ting frammanundan, fekk 308 atkvøður.

Næstu vikurnar verður Javnaðarflokkurin í Suðurstreymoy sostatt umboðaður av tveimum fólkum, sum bæði hava umboðað ein annan flokk – bæði á sum tingfólk og sum landsstýrisfólk.

Kristian Magnussen umboðaði Verkamannafylkingina á tingi og partvís í landsstýrinum frá 1994-1998, meðan Helena Dam á Neystabø umboðaði Sjálvstýrisflokkin á tingi og partvís í landsstýrinum frá 1990 – 2002.

Miðflokkurin:

# Fólkapensjónin tvífaldast

**Pensjónistarnir eiga eisini at fáa lut í búskaparvøkstrinum seinastu árini. Tí skjýtur Miðflokkurin upp, at fólkapensjónin verður tvífaldað næstu fýra árini**

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Tá løgtingið kemur saman í morgin kl 13:30, verður fyrsta viðgerð av uppskoti frá Miðflokkinum um áseting og javning av almannaveitingum til viðgerðar.

Miðflokkurin skjýtur upp, at fólkapensjónin verður hækkað yvir eitt fýra ára skeið soleiðis, at stakir pensjónistar frá at fáa góðar 50.000 kr um árið í fólkapensjón, fáa góðar 100.000 kr um árið, meðan hjún frá at fáa slakar 40.000 kr í 2009 fara at fáa slakar 83.000 kr.

Jenis av Rana sigur í viðmerkingunum, at búskaparvøksturin seinnu árini hevur ført til hækkandi livistøði hjá flestu føoyingum, meðan tey, sum einans hava fólkapensjónina at líta á, ikki í sama mun hava fingið lut í betraða livistøðinum. Hann vísir eisini á hækkandi oljuprísir, eitt tyngjandi oljuavgjald, øktar eykaskattir so sum vegskatt og kringsvarpsgjald – alt er við til at tyngja um húsarhaldið hjá pensjónistunum.

- Og hóast skattalættar eru veittir ávísum samfelagsbólkum, koma hesir ikki fólkapensjónistunum við ongari hjáinntøku til gagns – heldur eru dømi um, at skattalættarnir økja um eftirspurningin og harvið hækka prísirnar, sigur Jenis av Rana.


*Jensi av Rana heldur, at samfelagið við verandi lønarhækkngum rennir skjótari enn fólkapensjónin megnar at fylgja við*

Jenis av Rana heldur fólkapensjónina vera so lága, at tað er ósømiligt at bjóða pensjónistunum hana – fólki, sum gjøgnum eitt langt arbeiðslív hava lyft samfelagið upp á núverandi støði. Hann sigur eisini, at hóast landsstýrissamgongan hevur lovað batar, so er alt ov lítil ferð á batunum.

- Við verandi lønarhækkingum og øðrum framstigum rennur samfelagið skjótari enn fólkapensjónin megnar at fylgja við, sigur Jenis av Rana.

# Lýsa lívfrøðiliga margfeldi

POLITIKKUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Næsta mál á dagsskránni til tingfundin í morgin verður uppskot, sum Hergeir Nielsen hevur lagt fram vegna Tjóðveldisflokkin. Uppskotið snýr seg um, at løgtingið heitir á landsstýrið um beinanvegin at taka stig til at lýsa margfelda lívið í føroysku náttúrini soleiðis, at altjóða sáttmálin um lívfrøðiligt margfeldi frá 1993 verður hildin.

Hergeir Nielsen vísir á, at altjóða sáttmálabundnar skyldur at verja náttúruna og at tryggja fyrisitingarligar, skilagóðar og vælgrundaðar avgerðir náttúruni viðvíkjandi hvíla á Føroyum.

- Í 1993 samtykti Løgtingið sáttmálan um lívføðiligt margfeldi. Sáttmálin er sera víðfevndur. Nógvar ásetingar eru í honum, og ein teirra er 2010 málið um at støðga afturgongdini av lívfrøðiligum margfeldi.

Hann sigur, at lívfrøðingar í Føroyum halda gongdina í náttúruni sum heild vera sera negativa, og at ongar veruligar kanningar verða gjørdar, sum lýsa hesa afturgongd, ella hvat gerast skal fyri at støðga henni.

Uppskotið frá Tjóðveldisflokkin verður beint í rættarnevndina.

# Meiriluti fyri tvungnum foreldramyndugleika

**Ein meiriluti í Fólkatinginum sigur seg vera sinnaðan at broyta donsku lógina um foreldramyndugleika, so donsk foreldur kunnu verða tvungin at býta hann ímillum sín. Landsstýrið arbeiðir hinvegin við at seta lógina í gildi í Føroyum, sum meirilutin sigur seg vilja broyta**

FORELDRAMYNDUGLEIKI
*Theodor E. D. Olsen*
*theodor@sosialurin.fo*

Sum nú er, ber bert til at hava felags foreldramyndugleika í Danmark, um bæði foreldrini ynskja hetta. Ein politiskur meiriluti sigur seg eisini vera fyri at gera skipanir, har børnini vera meira hjá báðum sínum foreldrum. Tað skrivaði Politiken um vikuskiftið.

Talan er um Sosialdemokratarnar, Danska Fólkaflokkin, SF og Radikala flokkin, sum siga seg ynskja at broyta lógina, so myndugleikarnir fáa fleiri amboð at noyða foreldur at samstarva - ella at fyribyrgja stríð, sum royndir úr Svøríki eisini vísa, at slíkar skipanir kunnu brúkast til. Flokkarnir ynskja harafturat at geva myndugleikunum betri møguleikar at veita ráðgeving og mekling.

Lone Dybkjær úr Radikala flokkinum skjýtur upp, at orðið foreldramyndugleiki verður broytt til foreldraábyrgd.

### 2. floks foreldur

Serfrøðingar í familjurætti eru sambært Politiken samdir í, at bæði foreldur eiga at hava ábyrgd fyri børnum teirra, og at fleiri foreldur uttan at vilja tað kenna seg sum eitt slag av annanfloks-foreldrum, tá tey verða dømd frá foreldramyndugleikanum, hóast tey verða mett sum egnað foreldur.

Harafturat verður fýlst á, at foreldur uttan foreldramyndugleika ikki fáa t. d. innlit í heilsustøðuna hjá børnunum ella atgongd til upplýsingar frá skúla ella dagsstovni.

- Hetta er ein absurd støða, tí eitt barn hoyrir jú ikki til bara annað av foreldrunum, vísir Britt Elling frá advokatfelagnum Lund Elmer Sandager á.

### Politiken varpar ljós á málið

Oddagreinin í Politiken í gjár tekur undir við fólkatingsmeirilutanum, og metir, at nógv rættarmál helst høvdu verið avlýst, um mamman visti, at felags foreldramyndugleiki varð úrslitið, eins og tað ofta er í Svøríki.

- Sum í einum surrealistskum tíðarlumma hevur Danmark enn í 2006 eina løggávu, ið merkir, at mamman sum oftast fær fullan foreldramyndugleika yvir barninum, um ósemja er. Hóast pápin er púra normalur, vísir umsorgan og er eins vælvirkandi og mamman, viðførir galdandi lógarpraksis, at kvinnan kann nokta pápanum felags foreldramyndugleika, skrivar leiðarin í Politiken.

Uppskotið hjá fólkatingsmeirilutanum er víðgongdari enn uppskotini hjá ein nevnd, ið sett varð av Lars Barfoed, familjumálaráðharra, og sum herfyri vórðu løgd fram í einum rúgvusmiklum áliti. Men ráðharrin er kortini jaligur mótvegis meirilutanum, hóast hann hevur síni fyrivarni.

- Tað vanliga átti at verið, at foreldrini býttu foreldramyndugleikan millum sín. Men tað eru støður, har einaforeldramyndugleiki enn vil verða betri, av tí at tað annars vil koma at merkja óendaligt, slítandi stríð, sum barnið stendur mitt í, sigur Lars Barfoed.

Jacob Vestergaard, landsstýrismaður í innlendismálum, hevur áður boðað frá, at hann ætlar at leggja ríkislógartilmæli um verandi donsku lóg um foreldramyndugleika fyri Løgtingið, so núverandi danska lóg kann setast í gildi í Føroyum.

# Útvarpið flytir tíðindini til klokkan 18.00

**Kringvarpið ætlar at gera kollveltandi broytingar í skránni. Tíðindini skulu flytast til klokkan 18.00, og Dagur & Viku verður framhaldandi kl. 19.00**

KRINGVARP
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Føroyingar kring alt landið kunnu vænta kollveltandi broytingar í skránni hjá kringvarpinum í vetur. Bæði sjónvarpi og útvarpi fara at hava ymiskar broytingar í skránni í vetur, sum føroyingar sum heild ikki eru vanir við.

Tað munnu vera nógv, sum eru von at seta seg niður at lurta eftir tíðindunum klokkan 18.30, meðan tey eta ein góðan náttturðabiti. Tað ljóðar, at so fer ikki at vera framyvir.

Tíðindini, sum altíð hava verið kl. 18.30, fara nú at vera flutt til klokkan 18.00, og hetta er einki minni enn ein kollveltandi broyting hjá kringvarpinum.

Tíðindini vera væntandi ikki einasta broyting, sum kringvarpið fer at fremja. Sendingin, Dagur & Vika, sum hevur verið send klokkan 19.00 í summar, fer framhaldandi at hava hesa senditíð.

Dagur & Vika hevur annars altíð verið kl. 20.00, men nú ljóðar, at kringvarpið ætlar at halda fast um senditíðina, sum teir hava nýtt í summar. Hetta verður eisini ein stór broyting hjá kringvarpinum.

Vit tosaðu við stjóran í kringvarpinum, Jógvan Jespersen, men hann vildi ikki gera viðmerkingar til skránna fyribils.